## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur og um kvøldið snarar hann í útsynning. Sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum ÷ 1 og + 2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri, um kvøldið upp í skrið av vestri. Stundum regn og hitin kemur upp í 3 til 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin gul millum vestan og norðan, men út á seinnapartin veksur hann vindin til skrið av landnyrðingi og kavaælingur. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fyrst upp í hvassan vind av norði og útnyrðingi og kavaælingur, men sunnudagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷ 2 og ÷6 stig.

# Fjøruseyður reikar runt við strendur

Hendan dagin, myndamaðurin kom fram við í Leynum, var væl av seyði á sandinum.

Ikki er tað óvanligt, at seyður leitar sær í fjøruna at eta tara. Mangar eru frásagnirnar um, at seyður er farin líka úr fjallinum oman í fjøruna at eta tara, og hava menn undrast á, hvussu hann kundi vita, at fjøra var júst tá. Ivaleyst hevði hann skil á sjóvarfallinum, vildi onkur halda.

So vóru tað aðrir, sum hildu, at tað mundi standa heldur smáliga til við tí skilinum, tí ikki var tað so sjálvdan, at hann fløddi út og druknaði.

Hetta kenna vit eisini aftur í skaldskapinum. Eitt nú úr sálminum um seyðamannin hjá Mikkjali á Ryggi, har hann sigur : »Eg títt í fjøru fastur stóð, tín hond meg hevjaði frá flóð«. Jú onkuntíð hevur røktingarmaðurin verið noyddur at bjarga fjøruseyði.

Aðrastaðni í skaldskapinum hjá Mikkjali á Ryggi verður tikið eitt sindur meira háðandi til um fjøruseyðin. Sum tá Havgímur í Brestiskvæðinum ilskast inn á Gøtu Trónd og spyr: »Hví manst tú sum fjøruseyður reika runt við strendur?«

Hesar á Leynasandi høvdu onga orsøk at óttast fyri at fløða út, men fingu onkran góðan bita av taranum, rikin var upp hendan dagin.



*Taraseyður*
*Myndamaður: Edvard Joensen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷18 |
| Nuuk | ÷17 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | ÷2 |
| Reykjavík | ÷6 |
| Seyðisfjørður | ÷5 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | – |
| Aberdeen | 5 |
| London | 8 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 16 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 19 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Ein hátrýstryggur við Føroyar fer eystureftir og eitt lágtrýst, 986 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landsynning eystan og dýpist.




Lágtrýstið yvir Skotlandi fer eystureftir og dregur eitt skifti kalda luft móti Føroyum. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og hevur eitt skifti lýggjari luft við sær.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/02 kl. 06⁰⁰– 19/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷1,0°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 18/02 kl. 06⁰⁰– 19/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 101,2 mm




fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

14. februar: Mánin longst frá jørðini
20. februar: Fyrra kvarter
27. februar: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. feb | — | 12.16 | 11.16 | 23.51 | 11.31 | — | 01.41 | 14.16 | 02.41 | 15.16 | 10.31 | 23.06 | 09.31 | 22.06 | — | 12.31 | 00.56 | 13.31 | — | 12.01 | 00.41 | 13.16 |
| 21. feb | 00.51 | 13.28 | — | 12.28 | 00.06 | 12.43 | 02.51 | 15.28 | 03.51 | 16.28 | 11.43 | — | 10.43 | 23.20 | 01.06 | 13.43 | 02.06 | 14.43 | 00.36 | 13.13 | 01.51 | 14.28 |
| 22. feb | 02.05 | 14.30 | 01.05 | 13.30 | 01.20 | 13.45 | 04.05 | 16.30 | 05.05 | 17.30 | 00.20 | 12.45 | 11.45 | — | 02.20 | 14.45 | 03.20 | 15.45 | 01.50 | 14.15 | 03.05 | 15.30 |
| 23. feb | 02.56 | 15.22 | 01.56 | 14.22 | 02.11 | 14.37 | 04.56 | 17.22 | 05.56 | 18.22 | 01.11 | 13.37 | 00.11 | 12.37 | 03.11 | 15.37 | 04.11 | 16.37 | 02.41 | 15.07 | 03.56 | 16.22 |

5 707265 100036 >